## Á Rás2 í morgin

Í verkætlanini hjá 6. og 7. flokki við Skála skúla eru 12 næmingar. Tey hava veruliga stríðst fyri at koma fram til hetta góða úrslitið, og hava tí uppiborið alla góða umrøðu í hesum sambandi. Umframt hesa greinina, verða tey eisini at hoyra í morgunsendingini á Rás2 fyrrapartin í morgin.



## First Lego League á øðrum sinni

Aftur í ár verður skipað fyri hesi kappingini, sum fekk so góða undirtøku í fjør. Evnið fyri kappingina í ár er »Climate Connection« og snýr seg um veðurlagið og veðurlagsbroytingarnar. Kappingin fer fram í 40 londum, og fer vinnandi føroyska liðið víðari til eina norðurlendska kapping. Kappingin verður hildin 8. november í bygninginum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Í fjør luttóku 14 lið, men í ár verður møguleiki hjá 16 liðum at luttaka

# Næmingur: Sigur tú U -

**- Vit behøvast ikki at fara so langt fyri at síggja ting, sum kunnu oyðileggja umhvørvið. Hygg bara eftir skipasmiðjuni í bygdini og hvussu nógv dálking er har. Ja, hon er ein rein umhvørvisbumba!, siga næmingar úr 6. og 7. flokki við Skála skúla**



UMHVØRVI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Frederiksen*

**Skála:** - Tað er næstan so, at bara eg hoyri eitt orð sum byrjar við U, so hugsi eg um umhvørvið!

Orðini eigur ein av ídnu næmingunum í 6. og 7. flokki við Skála skúla, og sum vunnu føroysku útgávuna av Lego League-kappingini. Í Danmark gjørdust tey næstbest, og leygardagin gongur leiðin til USA at luttaka í eini kapping millum luttakarar úr øllum heiminum.

Í hesi verkætlanini hava tey arbeitt við alternativari orku og hava sjálvi víst á, hvussu ein kann umseta hetta til veruleika, og hvussu tann einstaki kann gera nakað fyri náttúruna og umhvørvið.

Orð sum hitapumpur, útlát, alternativ orka, sólfangarar, alduverk, vindmyllur og fleiri ruddingardagar eru nøkur av orðunum, sum verða havd ofta á lofti, hesa løtuna, tá Sosialurin vitjaði næmingarnar í báðum flokkunum fyrrapartin í gjár.

- Vit vita nú meiri um orku og umhvørvið enn hvat vit vistu áðrenn. Um vit sjálvi ger nakað við tað fyrst, so fara onnur vónandi eisini at gera tað sama.

- Á henda hátt kunnu vit øll gera okkara til, at verja náttúruna og umhvørvið. Her kunnu vit øll gera mun, ljóðar samfelda svarið frá næmingunum.

Ein av ítøkiligu uppskotum teirra er, at kommurnurnar skipa fyri fleiri ruddingardøgum og at tey sjálvi minnast til at sløkkja hitan í teirra egna sovikamari, tá tey fara í skúla.

Hóast tey í kappingini itu »Junior Kids« er eingin ivi um at tey hugsa sum vaksin, tá tað snýr seg um vernd av náttúru og umhvørvi!

### Úr hjarta og heila

Hóast tey ikki beinleiðis hava lagt størstan dentin á orku og umhvørvi, so er eingin ivi um, at fyrireikingarnar til kappingarnar hava gjørt nakað við øll hesi ungu skálafólkini.

Ein fær beinanvegin varhugan av, at hetta við orku og umhvørvi ikki bert er nakað sum tey hava lisið seg til ella latið sær siga:

Hetta er nakað sum tey hava tikið at hjarta sínum. Og hetta er uttan iva nakað, sum tey framyvir vilja stríðast fyri.

Teirra hægsta ynski er, at tey sjálvi, tað einstaka skálafólkið og tann einstaki føroyingurin gera sítt til, at føroyska náttúran og umhvørvið verða varðveitt í framtíðini. Og at myndugleikarnir ikki gloyma tað.

Í arbeiðinum við verkætlanini hava tey funnið fram til tað, sum tey sjálvi kunnu gera. Og hvussu týdningarmikið tað er, at ein ikki bíðar við hesum til í morgin.

- Man sær ofta plastikkposar liggja og flóta í náttúruni. Men hugsar nakar um, at tað tekur náttúruni 100 ár at eta ein slíkan plastikkposa upp?, sigur ein næmingur.

Ein annar er skjótur at leggja aftrat: - Ja, hvør hugsar um, at tað eisini tekur langa tíð hjá náttúruni at eta eitt bananskal!

### Myllur larma og geva streym

Í samband við verkætlan sína, hava tey gjørt eitt modell av eini vindmyllu og sólkyknum sum geva streym og orku til eitt hús og eina vatnmyllu.

Júst hetta við teimum alternativu orkukeldunum tykist vera nakað, sum tey veruliga hava arbeitt nógv við. Teirra sannføring er, at tær fýra vindmyllurnar í Neshaganum hinumegin fjørðin kundu verðið enn fleiri.

- Tað snilda við hesum myllunum er, at tær geva streym, tað kostar bert at seta tær upp og so geva tær einki CO2-útlát. Bara myllurnar í Neshaganum geva 6 % av allari streymnýtsluni.

- Tað er heilt sikkurt, at vit kundu havt fleiri slíkar myllur runt alt landið. Eg meini – alt ger mun, greiðir ein av gentunum frá.

Ein drongur á aftasta beinki er skjótur at leggja aftrat:

- Tað einasta keðiliga við vindmyllunum er, at tær larma nokkso nógv. Men standa tær úti í haganum, so hoyrir eingin tær!

Í teirra hugaheimi er hetta vegurin fram – stórar og nógvar vindmyllur, sum kunnu veita fólki streym og orku.

- Fyri okkara skuld kundi ein bara fylt Lítlu Dímun við vindmyllum. So hevði verið nóg mikið av streymi til rættiliga nógv fólk, ljóðar eitt av uppskotunum frá einum av yngru næmingunum í flokkinum.

### Skilt boðskapin

Vindorkan er bert ein av møguleikunum sum hesir

*Hugsar nakar um, at tað tekur náttúruni 100 ár at eta ein plastikkposa upp?*

*Tað hevði verið rættiliga rotið um allar áirnar her á Skála blivu burtur – og alt kanska hevði mint meiri um eina oyðimørk í okkara vøkru bygd*